video/dvd 3arin fløgur

## 40 days and 40 nights



Hetta er ein komedia við Josh Hartnett, sum vit eisini kenna frá Pearl Harbour. Hann spælir millum annað saman við Shannyn Sossamon, sum var við í A Knight´s Tale. Matt Sullivan er við at koma yvir, at hann og gentan eru farin frá hvør øðrum. Fyri at lætta um, lovar hann, at hann ikki skal hava nakað sex í 40 dagar. Tað kann tykjast ringt, og tað verður als ikki lættari tá hann hittir sína dreymagentu.

Teir, sum hava gjørt Bridget Jones´ Diary hava eisini gjørt henda filmin, ið nevnist 40 days and 40 nights. Filmurin er júst komin út á dvd.

## How High



Hiphop og rappstjørnurnar, Method Man og Redman, spæla høvuðsleiklutirnar í hesum filminum, sum er um, hvussu stuttligt tú kanst hava tað tá tú ert skeivur. Fyri Silas og Jamal er lívið bert um at vera skeivur og um at skora gentur. Tann einasti niðurtúrurin er skúlin. Heilt inntil Silas fær hendur á nøkrum góðum potti, sum ikki bara ger teir skeivar, men eisini góðar í skúlanum. So góðar, at teir koma inn á Harvard...

## Whitney Houston
### – Just Whitney



Hetta er fyrsta fløgan Whitney Houston gevur út í fýra ár. Hon hevur saman við manninum, Bobby Brown. Fløgan kom út tann 25. november, og hon hevur 11 skeringar. Harumframt ber til at leggja fløguna í dvd spælaran, tí videoløg eru eisini við.
Eitt av løgunum, My Love, nevnist tað, syngur Whitney saman við Bobby. Umframt hetta er eisini eitt lag saman við P.Diddy. Ummælarar meta, at henda fløgan er ikki júst tann vøra, vit eru von við frá Whitney, men um tú sjálv/ur vilt vita, so er ikki annað at gera enn at meta um.

## Missy Elliott
### – Under Construction



Elektra hevur nú givið út eina nýggja fløgu við Missy Elliott. Svarta sangarindan nevnir plátuna »Under Construction«. Fløgan hevur hevur 14 skeringar, har fleiri av løgunum eru saman við øðrum sangarum. Millum annað er Beyonce Knowles úr Destiny´s Child við í einum lagi, og gentubólkurin TLC í einum øðrum.

## sum 41 – does this look infected?

»Heavy Metal and Mullets is how we were raised, Maiden and Priest were the G-d's that we praised.« Soleiðis lýsa Sum 41 seg sjálvar í lagnum »Fat Lip« av síðstu fløguni. Og hettar vørumerki verður eisini væl og virðiliga uppfylt í triðju studioútgávuni »Does this look infected?«

Á fløguni hoyrist bæði Iron Maiden og Metallica aftur í summum av løgunum. Men hóast tað, slepst ikki uttanum »dreingjareyvs punkin« ið næstan øll amerikansk orkestur spæla í dag. Stílurin ellars á fløguni minnir nógv um Blink 182, Green Day, Good Charlotte og onnur orkestur í hesum stílinum.

Stílurin hjá Sum 41 er nokk eitt sindur harðari og brutalari enn hjá hinum orkestrunum ið spæla hendan tónleikastíl, eisini er meira íblástur frá heavy metal stílinum, og ferðin á løgunum er nokk nakað væl hægri. - ...tí um vit hyggja nærri eftir fløguni, so síggja vit at teir klára uttan stórvegis himpr at buldra 12 løg ígjøgnum uppá góðan hálvan tíma. Ella fyri at útdjúpa tað eitt sindur meira, so er longsta lagið á fløguni 3,28 min og stytsta lagið 37 sekund.

Við at blaka hesa fløguna í fløguspælaran, keðir tú teg ikki eitt sekund, - ...fløgan er ótrúliga væl arrangerað og framførd, - ...og har er eingin »slingur í valsinum«. Løgin eru hørð og kontant, men allíkavæl sera melodiøs og íoyrafallandi, - ...so ein kann næstan ikki forlanga meir.

Til tey ið eru uppvoksin við, ella bara elska Metallica, Judas Priest, Iron Maiden osv. Er hendan fløga ein absolutt MUST. So mítt boð er: Setið ein hálvan tíma av til »Does this look infected?« - tit angra tað ikki;)

fakta:

| | |
|---|---|
| bólkur/einstaklingur: | sum 41 |
| heiti á útgávu: | does this look infected? |
| útgávudato: | 26. november 2002 |
| skeringar á útgávu: | 12 |
| longd á útgávu: | 31.12 min |
| framleiðari: | greig nori |
| útgávufelag: | island records (universal) |
| heildarmeting: | ●●●●◖ |



### topp.10/cd-rom

1. medal of honor – allied assault
2. fifa football 2003
3. total club manager 2003
4. sims – unleashed
5. unreal tournament 2003
6. hitman 2
7. battlefield 1942
8. age of mythology
9. ghost of recon complete
10. morrowind – the elder scrolls

### topp.10/dvd

1. 40 days and 40 nights
2. den skjulte sandhed
3. big fat liar
4. men in black 2
5. scorpion king
6. kingenes herre – the fellowship of the ring
7. spiderman
8. resident evil
9. how high
10. ice age

### topp.10/videofilmar

1. 40 days and 40 nights
2. scorpion king
3. big fat liar
4. den skjulte sandhed
5. ice age
6. spiderman
7. ringenes herre – the fellowship of the ring
8. blade 2
9. men in black 2
10. star wars – klonernes angreb

### topp.10/fløgur

1. popp list
2. now 2
3. drós
4. westlife – greatest hits unbreakable vol. 1
5. now 53
6. replay dance mania
7. shanaia twain – up
8. robbie williams escapeology
9. eminem – the eminem show
10. jólafløgan

3arin

# ítróttur

Nr. 243 • mikudagur • 18. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Klaksvíkingur millum tey frekastu í Bergen

**Hann hevur leingi verið millum fremstu norsku kurvabóltsleikararnar, men nú telist Calix Black eisini millum teir vakrastu**

KJÓSAN
*Jákup Mørk*



*Sambært BA telist Calix Black millum tíggju tey frekastu ítróttafólkini í Bergen-økinum*

Nýggjárið er vanliga hátíðin, har kjósanir av ymsum slag skulu fáast frá hondini, og normenn eru sjálvandi einki undantak í so máta.

Einari av mongu kjósanunum, sum fara fram komandi dagarnar, stendur lokalavísin í Bergen, BA, fyri. Her hava tey sett sær fyri at finna útav, hvør ítróttaíðkari í Bergen er tann frekasti. Ella sagt við øðrum orðum »Bergens og omegns mest sexy idrettsudøver«.

Tað verða lesararnir hjá blaðnum, sum gera av, hvør fær hendan heiðurin, men fyri at avmarkað kapprenningina um heitið nakað, hevur BA longu nú gjørt av at innstilla 10 ítróttafólk, sum lesararnir so kunnu geva sína atkvøðu.

Millum fleiri kend norsk ítróttanøvn, so sum hondbóltsleikarin Mia Hundbvin, HM-vinnarin á rulluskoytum Kari Traa, skoytiprinsessuna Chona Anderl og fótbóltsleikaran Thorstein Helstad er eisini ein føroyingur at finna. Hálvi klaksvíkingurin, Calix Black Ndiyae er sambært BA nevnliga eisini at finna millum vakrastu og frekastu ítróttarfólkini í Bergen.

Enn er so ikki gjørt av, hvør av teimum tíggju kandidatunum fer avstað við sigrinum, men fyri viðkomandi man tað so verða ein heldur øðrvísi heiður enn tann, sum tey vanliga vinna í ítróttahøpi.

## Framúrskarandi í Argentina

**Heidi Andreasen vann eisini eitt bronsumerki í seinastu kappingini, og hevur sostatt trý heiðursmerki við sær, nú hon kemur heimaftur**

SVIMJING
*Jákup Mørk*



*Hóast hon ikki roknaði við nøkrum, so vann Heidi Andreasen ikki færri enn trý HM heiðursmerki í Mar del Plata í Argentina*

Sum nevnt í týsdagsblaðnum, so hevði Heidi Andreasen tryggjað sær tvey silvurmerki í HM-kappingini í Mar del Plata í Argentina. Í hesum høvdu vit tó ikki fingið seinasta heiðursmerki hennara.

Heidi vann nevnliga eisini eitt bronsumerki, tá finalan í 50 metra frísvimjing var á skránni á seinasta kappingardegnum. Sostatt vann Heidi trý heiðursmerki í fýra kappingum, og tað kann neyvan sigast vera annað enn framúrskarandi, tá hugsað verður um fortreytirnar, sum hon hevði undan hesi kappingini.

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**
Mjølnir-Fleyr 3-0 (25-14, 25-20, 25-15)
ÍF-KÍF 3-0 (25-16, 25-20, 25-14)
Dráttur-TB 0-3 (19-25, 8-25, 24-26)

**Meistaradeild menn**
ÍF-Fram 3-2 (23-25, 25-21, 23-25, 25-20, 15-6)
Mjølnir-Fleyr 3-0 (25-7, 25-18, 25-10)

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 10 | 8 | - | 2 | 26 | 9 | 17 | 16 |
| 2 ÍF | 10 | 8 | - | 2 | 28 | 12 | 16 | 16 |
| 3 Mjølnir | 10 | 7 | - | 3 | 25 | 12 | 13 | 14 |
| 4 Dráttur | 10 | 5 | - | 5 | 18 | 23 | -5 | 10 |
| 5 KÍF | 10 | 1 | - | 9 | 7 | 27 | -20 | 2 |
| 6 Fleyr | 10 | 1 | - | 9 | 6 | 27 | -21 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 8 | 8 | - | 0 | 24 | 2 | 22 | 16 |
| 2 Mjølnir | 7 | 5 | - | 2 | 15 | 9 | 6 | 10 |
| 3 Fram | 8 | 4 | - | 4 | 16 | 13 | 3 | 8 |
| 4 SÍ | 7 | 2 | - | 5 | 8 | 15 | -7 | 4 |
| 5 Fleyr | 8 | 0 | - | 8 | 0 | 24 | -24 | 0 |